SEA-STAR

## Lastbilførari

Søkt verður eftir førara við stórum koyrikorti til lastbil okkara at byrja skjótast gjørligt. Bilurin hevur 17,5T krana, og er tað tí ein fyrimunur, um tú hevur kranaloyvið.

Umsøkjarin má eisini verða tilreiðar, at átaka sær aðrar uppgávur í felagnum, tá tað gerst neyðugt.

## Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur/Byggiteknikari

Vegna økt virksemi verður hervið søkt eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella byggiteknikara. Tú kemur í høvðusheitum at hava byggileiðslu og tilrættislegging av byggiarbeiðum um hendi. Eisini verður tín uppgáva:

- Tilboðsútrokning
- Uppfylging
- Innkeyp
- Eftirlit
- o.a. sum hoyrir starvinum til

**Førleikakrøv**
Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur, byggiteknikari ella líknandi ástøðiliga útbúgving og hevur kt-kunnleika á brúkarastøði. Fyrimunur er eisini at hava royndir við byggileiðslu.

Vit arbeiða mest í Føroyum og Grønlandi, so umsøkjarin kann eisini roknað við nakað av ferðing í starvinum.

Løn og treytir verða smb. avtalu.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Jákup Martin á tlf. 59 00 59, ella til skrivstovuna á tlf. 44 99 77

**Umsóknarfreistin er 23.06.2008**
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SEA-STAR Contractors Spf.**
Heiðavegur 72
Postboks 220
610 Saltangará

**SEA-STAR Contractors Spf.** er stovnað í 2003. Í høvuðsheitum fáast vit við betongarbeiðir, byggiarbeiðir av vinnubygningum og havnabygging. Eisini reka vit persónbilaverkstað. Í løtuni byggja vit høll á Toftum, har ætlanin er at framleiða betongelementir. Uml. 40 fólk starvast hjá fyritøkuni. Dóttirfelagið SEA-STAR Diving Spf. er eitt kavarafelag, har uml. 5 mans starvast.

# Málningur

eftir Steffan Danielsen



Málningur hjá Steffan Danielsen, 1958, til sølu.
Stødd 40 x 90 cm.
Málningurin kann síggjast í Glarsmiðjuni.

**Glarsmiðjan · Dr Jakobsensgøta 7**
**100 Tórshavn · tel: 31 06 23 / 21 66 23**

# SKÁLAVÍKAR SKÚLI

**Hesi størv verða lýst leys til setanar 1. august 2008:**

- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar. Starvið er uml. 8 tímar um vikuna.
  Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í:**

- enskum í 4. og 5. árgangi
- náttúru / tøkni í 4. og 5. árgangi

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving er ynskilig.
Onnur eru tó eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 - 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

- 1 stuðulsfólk 20 tímar um vikuna til næming við fjølbreki.

**Førleikakrøv:**
Fyrimun hava umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum.

Løn eftir sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 28. juni 2008 kl.12.00

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristinu Mikkelsen, skúlaleiðara, Sandabrekkan 4, FO-210 Sandur, á tlf. 361127 / 277527 ella teldupost: kristina.mikkelsen@skulin.fo

**Skálavíkar skúli** hevur komandi skúlaár 12 næmingar í 1. – 5. árgangi, 3 lærarar og 1 stuðulsfólk.

# ARGJA SKÚLI

## GLOYMD KLÆÐIR í Argja skúla

Klæðir o.a., sum er gloymt í Argja skúla hetta skúlaárið, liggur frammi í miðhøllini í nýggja skúla **mánadagin 16/6** til og við **mikudagin 18/6**, báðar dagarnar til **kl. 17.00**.

Tað, ið ikki verður avheintað, verður latið Bláa Krossi.

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vág kommunu frá 18. august 2008 til 1. juli 2009.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági, Sosialu deild, NSR tænastuna ì Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 20 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara tlf.37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosiala deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 30 juni 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km, sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**

# Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við